# Ársfrágreiðing 2025



## Innihald

Fíggjarligt støðufesti í hásæti ............ 1
- Nevnd ............ 1
- Starvsfólk ............ 1

Landskassin er bjálvaður ............ 1
- Gjaldføri landskassans ............ 2
- Virðisbrævaavkast ............ 3
- Fíggjarmarknaðirnir í 2025 í stuttum ............ 4

Skuld landskassans ............ 5
- Nettoskuld landskassans ............ 5
- Frítíðargrunnurin ............ 5

Kredittvirðið tað sama – Aa2 ............ 6
Fíggjarligt støðufesti ............ 6
Føroya Váðaráð og systemiskir váðar ............ 8
Búskaparráðið ............ 9
Fíggjarviðurskifti Landsbankans ............ 11

## Fíggjarligt støðufesti í hásæti

Landsbankin virkar fyri fíggjarligum støðufesti og er fíggjarstovnur hjá landinum. Uppgáva Landsbankans er, umframt at umsita ogn og skuld landsins, at eygleiða og greina fíggjargeiran og búskapin sum heild, og gera vart við fíggjarligar váðar.

Landsbankin hevur fýra høvuðsendamál:

1) Virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum
2) Røkja gjaldførið hjá landinum
3) Røkja skuldina hjá landinum
4) Kunna politisku skipanina og almenningin

Landsbankin er skrivstova hjá Føroya Váðaráði. Váðaráðið hevur sum uppgávu at:

1) Eyðmerkja systemiskar váðar
2) Hava eftirlit við systemiskum váðum

Ein onnur uppgáva hjá Landsbankanum er at røkja skrivarauppgávuna fyri Búskaparráðið.

Búskaparráðið hevur sum uppgávu:

1) Árliga at gera 2 konjunkturfrágreiðingar
2) Møguligar gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum

Landsbankin umsitur eisini Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Búskapargrunnin.

Landsstýrisfólkið í fíggjarmálum setur nevndarlimirnar í Landsbankanum eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum og hann velur eisini formannin.

### Nevnd

Fimm fólk sita í landsbankanevndini:

- Johnny í Grótinum, formaður
- Jan Otto S. Holm
- Hans Ellefsen
- Anja Rein og
- Marjun Weihe Thomassen

Nevndin í landsbankanum er samstundis eisini Búskaparráðið.

Í 2025 hevur nevndin havt 6 fundir í landsbankanevndini og 7 fundir í búskaparráðnum í sambandi við konjunkturfrágreiðingarnar og temafrágreiðing. Harumframt hevur Búskaparráðið eisini verið á virkisvitjanum í sambandi við búskaparfrágreiðingarnar. Umframt hesar fundir hevur Búskaparráðið og Landsbankin eftir umbøn verið á fundi við tingnevndir og skriva hoyringsskriv um búskaparligar avleiðingar av lógaruppskotum.

### Starvsfólk

Starvsøkið hjá landsbankanum kann býtast í tvey høvuðsøki: ein bankapart og ein greiningarpart. Bankaparturin arbeiðir við lántøku, skuld og íløgurøkt av gjaldførinum hjá landskassanum, meðan greiningarparturin framleiðir, savnar, og greinar hagtøl um føroyska fíggjargeiran og búskapin, og kunnar um týdningarmestu viðurskiftini, ið síggjast í hagtølunum.

Skrivarauppgávan fyri búskaparráðið, sum kom afturat í 2021, hevur fylt nógv hjá nevndini og í umsitingini hjá bankanum. Her eru tað serliga konjunkturgongdin og útlit, sum verða lýst. Í oktober 2025 kom eisini temafrágreiðingin um kommunubúskapin og eldraøkið. Temafrágreiðingin varð løgd alment fram í september 2025.

Í Landsbankanum starvast níggju starvsfólk umframt stjóran. Harafturat, um fíggjarætlanin loyvir tí, eru eisini tímalønt starvsfólk.

## Landskassin er bjálvaður

Lógin um Landsbanka Føroya staðfestir, at landskassin skal hava 15 prosent av BTÚ í minstagjaldføri. Ásetingin kom beint eftir

kreppuna í 90-árunum fyri at tryggja, at landskassin í kreppustøðum hevur tøkan pening at rinda lønir, pensjónir og aðrar útreiðslur við.

Minstagjaldførið er nóg stórt at rinda skyldurnar í umleið seks mánaðir, hóast landskassin ongar inntøkur hevur. Minstagjaldførið í 2025 var 3,975 mia. kr. og er 4,17 mia. kr. í 2026

**Gjaldføri landskassans**

Ein stórur partur av gjaldføri landskassans er settur í virðisbrøv uttanlands. Landsbankin fylgir einari íløgustrategi, ið hevur til endamáls at vinna landkassanum hóskandi avkast yvir tíð. Hetta verður gjørt við atliti til íløguváða og umsetiligheit á teimum virðisbrøvum, ið gjaldførið verður sett í, soleiðis at peningurin skjótt kann gerast tøkur, um tørvur er á tí.

Íløgustrategiin ásetur, at gjaldførið verður sett í stats- og realkredittlánsbrøv, altjóða partabrøv, altjóða virkis- og menningarlandalánsbrøv, umframt onnur alternativ íløgusløg í ávísan mun. Nærri upplýsingar um íløguheimild og íløgusamanseting Landsbankans eru at finna á heimasíðuni www.landsbankin.fo.[1]

Sambært landsbankalóg, kann Landsbankin eisini umsita ogn og skuld hjá almennum grunnum. Í 2025 hevði Landsbankin í miðal 238 mió. kr. undir umsiting fyri almennar grunnar. Ognin hjá grunnunum verður umsitin eftir sama leisti sum gjaldføri landskassans, og fáa grunnarnir tí sama avkast sum landskassin, tó frádrigið eitt umsitingargjald. Til ber at síggja innlánspolitikk á heimasíðu Landsbankans.

Í løtuni eru seks norðurlendsk feløg við til at røkta stóran part av gjaldførinum. Landsbankin hevði íløgurøkt í útboði á heysti 2024. Umframt at leingja avtaluna við fýra táverandi íløgurøktarar, varð røktaravtala eisini gjørd við tvey nýggj feløg. Nýggju avtalurnar komu í gildi frá ársbyrjan 2025.

Umframt tann partin av gjaldførinum, sum verður umsitin uttanlands, umsitur Landsbankin sjálvur eina røð av stats- og realkredittlánsbrøvum. Hetta verður gjørt fyri at tryggja smidleika í gjaldførinum til raksturin hjá landinum. Harumframt er ein partur av gjaldførinum settur í alternativar íløgur, eitt nú innan undirstøðukervi og private equity.

Landsbankin tryggjar eisini, at partur av gjaldføri landskassans er tøkur í Føroyum. Í 2025 var henda upphædd í miðal 180 mió. kr., og endurspeglar hon tørvin til dagliga raksturin. Restin av gjaldførinum er uttanlands, eisini fyri at avmarka møguligt órógv í føroyska fíggjarkervinum í kreppustøðu. Um fíggjarlig kreppa rakar Føroyar, er sannlíkt, at eisini føroyskir peningastovnar kunnu fáa gjaldføris-avbjóðingar. Stendur peningur landskassans tá í føroysku peningastovnunum, fær landskassin ikki brúkt peningin, uttan at gjaldføris-avbjóðingarnar hjá peningastovnunum gerast enn størri.

---

[1] Gamalt er, at øll egg ikki mugu leggjast í somu kurv. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum – at best er at seta pengar í fleiri enn eitt slag av virðisbrævi. Ein íløgurøð er tí ofta sett saman við ymiskum sløgum av lánsbrøvum (obligatiónum) og partabrøvum. Samansetingin hevur týdning, tí oftast gongur væl við partabrøvum, tá ið illa gongur við lánsbrøvum, og øvugt. Á fakmálið eitur tað at samvariatiónin er negativ, ið merkir at tá annað gongur væl gongur hitt illa. Soleiðis verður váðin meira spjaddur og váðin verður minni.

Mynd 1 vísir gongdina í gjaldførinum í 2025. Eisini vísir myndin miðal gjaldførið fyri árið, umframt krøvini til minstagjaldføri á ávikavist 15% og 13% av BTÚ.

*Mynd 1 – Gjaldførið hjá landskassanum 2025*




Myndin vísir, at gjaldføri landskassans í 2025 í miðal var 4,7 mia. kr., og at tað við ársenda var 4,8 mia. kr. Myndin vísir eisini, at gjaldførið hevur verið hægri enn ásetta minstagjaldførið alt árið. Tó var munurin lítil í einum tíðarskeiði frá august til oktober.

Á myndini sæst eisini, at landskassin tók lán tann 22. mai. Upphæddin var 1,32 mia. kr. Lántøkan var partvíst nýtt til at afturgjalda lán, sum fall til gjaldingar 2. juni, partvíst til at tryggja, at gjaldførið hjá landskassanum var omanfyri minstagjaldførið, og partvíst til at fíggja hall á fíggjarlógini. Harumframt hækkaði landskassin tann 10. januar eisini eitt langt lán, sum upprunaliga varð tikið í juli 2024, við 350 mió. kr. Hetta varð gjørt við atliti til lánið á 1,645 mia. kr., sum fall til gjaldingar tann 2. juni, og við atliti til gildistíðina á samlaðu lánsbrævaskuld landskassans.

Minstagjaldførið er hækkað frá 3,975 mia. kr. í 2025 til 4,170 mia. kr. í 2026. Minstagjaldførið verður ásett til 15% av BTÚ tvey ár frammanundan, tað vil siga, at minsta-gjaldførið í 2026 svarar til 15% av BTÚ í 2024. Tá minstagjaldførið fyri 2026 varð ásett í september 2025, varð mett, at BTÚ fór at vaksa við 3,3% frá 2023 til 2024. Hetta førdi við sær, at minstagjaldførið vaks við 195 mió. kr. frá 2025 til 2026.

**Virðisbrævaavkast**

Viðvíkjandi avkasti frá virðisbrøvum er vert at hava í huga, at virðisbrævakursir sveiggja dagliga. Hækkar kursurin á einum virðisbrævi, sum landskassin eigur, kann landskassin fáa meira fyri tað, um tað verður selt; lækkar kursurin, fæst minni. Hetta merkir, at virðið á samlaðu virðisbrævaognini støðugt broytist, og tí sveiggjar avkastið eisini frá einum ári til annað.

Tá mett verður um avrik frá einari íløgustrategi, er somuleiðis vert at taka hædd fyri váðastøðinum. Sum meginregla verður sagt, at íleggjarar skulu fáa løn fyri tann váða, teir átaka sær. Hetta merkir, at tess hægri váðin á einari íløgu er, tess størri avkast verður íløgan mett at kunna geva yvir tíð. Í hesum høpi verða partabrøv vanliga mett at hava hægri váða enn lánsbrøv. Tí vænta íleggjarar eisini, at ein váðaspjadd samanseting av partabrøvum í longdini gevur hægri avkast enn ein váðaspjadd samanseting av lánsbrøvum, men samstundis at sveiggj og møgulig tap kunnu vera størri, um gongdin ikki er til vildar. Ein virðisbrævaogn við stórum parti av partabrøvum verður tí vanliga mett at hava hægri váða enn ein ogn, har lánsbrøv fylla mest. Virðisbrævaognin hjá landskassanum hevur eitt stórt lutfall av lánsbrøvum, og hevur hetta ávirkan á bæði væntaða avkastið og metta váðastøðið.

Tá mett verður um, hvørt ein íløgustrategi er væl eydnað, er eisini hóskandi at hyggja at miðal avkastinum yvir eitt longri tíðarskeið. Talva 1 niðanfyri vísir árliga avkastið frá virðisbrævaognini hjá landskassanum síðani 2017. Í 2025 var avkastið 150 mió. kr., svarandi til 3,3%. Síðani 2017 hevur miðal avkastið verið

2,5%, ella 90 mió. kr. um árið. Tað er serliga 2022, sum dregur miðal avkastið niður.

*Talva 1 – Avkast av gjaldføri landskassans*

| Ár | Avkast % | Avkast mió. kr. |
|---|---|---|
| 2017 | 2,8 | 81 |
| 2018 | -1,4 | -46 |
| 2019 | 6,3 | 192 |
| 2020 | 1,9 | 74 |
| 2021 | 3,8 | 144 |
| 2022 | -8,6 | -293 |
| 2023 | 6,7 | 222 |
| 2024 | 7,3 | 283 |
| 2025 | 3,3 | 150 |
| **Miðal 2017-2025** | **2,5** | **90** |

Í talvu 2 niðanfyri sæst miðal avkastið av teimum ymsu íløgusløgunum, sum Landsbankin hevur gjørt íløgur í í 2025. Fyri øll íløgusløgini er talan um vinning. Peningur, sum landskassin hevur standandi á kontu í Føroyum, verður nýttur til dagliga raksturin hjá landinum. Hesin peningur eru ikki við í talvu 2.

*Talva 2 – Avkast av íløgurøð landskassans og grunnum í 2025, býtt á virðisbrævasløg.*

| Íløguslag | Miðal íløga mió. kr. | Býtið % | Avkast mió. kr | Avkast % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 1.163 | 24,5 | 49 | 4,2 |
| Statslánsbrøv | 73 | 1,5 | 0 | 0,4 |
| Realkredittlánsbrøv | 2.325 | 48,9 | 62 | 2,7 |
| IG lánsbrøv | 192 | 4,0 | 4 | 2,3 |
| HY lánsbrøv | 187 | 3,9 | 8 | 4,5 |
| EM lánsbrøv | 153 | 3,2 | 15 | 9,7 |
| Alternativar íløgur | 395 | 8,3 | 14 | 3,6 |
| Onnur fíggjaraktiv | 268 | 5,6 | 4 | 1,6 |
| **Íløgur tilsamans** | **4.756** | **100,0** | **158** | **3,3** |

## Fíggjarmarknaðirnir í 2025 í stuttum

Fyrstu mánaðirnar av árinum var gongdin á fíggjarmarknaðum óstøðug. Tað vóru serliga geopolitisk viðurskifti, ið ávirkaðu gongdina, eitt nú útsagnir og átøk frá myndugleikum um tollásetingar og handilsavtalur. Tá amerikanski forsetin fyrst í apríl legði fram ætlanir um nýggjar tollásetingar á nærum øll heimsins lond, førdi tað til stór fall á partabræva-marknaðunum. Kortini vendist hendan afturgongdin lutfalsliga skjótt til framgongd, so hvørt sum lond gjørdu nýggjar handilsavtalur sínámillum, og óttin fyri inflatión og búskaparligari afturgongd spakuliga minkaði.

Í seinna hálvári broyttist myndin munandi, og nýtt bjartskygni tók yvir. Hetta varð í stóran mun stuðlað av støðugum búskaparvøkstri, góðum roknskapartølum, nýggjum handilsavtalum og framhaldandi menning innan vitlíki. Harumframt lækkaðu miðbankar í bæði USA og Evropa sínar leiðandi rentur gjøgnum árið, og varð hetta eisini við til at styrkja íløguhugin og útlitini til góðum avkasti.

Samlað sæð góvu altjóða partabrøv eitt avkast á 7,7% í 2025. Serliga í Evropa og í fleiri menningarlondum vóru avkastini góð. Tøknigeirin var framvegis ein týðandi drívmegi, og serliga ávísar stórar fyritøkur í geiranum stóðu fyri einum munandi parti av samlaða avkastinum. Hetta endurspeglar eina gongd, sum hevur verið sjónlig seinastu árini, har vøkstur og avkast í vaksandi mun savnast á einstøkum feløgum. Gjaldoyragongdin hevði eisini ein týðandi leiklut fyri samlaða úrslitið, tí amerikanski dollarin viknaði munandi í mun til evropeisk gjaldoyru. Hetta hevði við sær, at avkastið fyri evropeiskar íleggjarar varð nakað lægri, enn tað annars hevði verið, um gjaldoyrakursirnir vóru óbroytt, og undirstrikar hetta gjaldoyravágan í altjóða íløgum.

Á lánsbrævamarknaðum var gongdin meira tvíbýtt. Stuttar rentur fullu tíðliga í árinum, stuðlað av væntanum um lækkingar í leiðandi miðbankarentum, meðan longu renturnar hækkaðu, millum annað orsakað av

geopolitiskari óvissu og útlitum til lagaligan fíggjarpolitikk altjóða og stórar almennar íløgur. Yvirskipað var tó talan um vinning frá bæði stats- og realkredittlánsbrøvum, og eisini fyri virkislánsbrøvum, so hvørt sum kreditspenn tódnaðu, og váðafýsnið hjá íleggjarum vaks gjøgnum árið.

## Skuld landskassans

Við árslok 2025 var marknaðarvirðið á lánsbrævaskuld landskassans 5 mia. kr. Skuldin er sett saman av fimm brævalánum, sum øll eru standandi lán. Hetta merkir, at bert renta verður goldin í lánitíðini, ímeðan sjálv lániupphæddin verður afturgoldin í einum, tá ið lánitíðin er úti.

Talva 3 niðanfyri vísir tey fimm brævalánini, sum landskassin hevur. Av teimum fimm lánsbrævarøðnum verður eitt lán afturgoldið í 2026, meðan hini fýra verða afturgoldin í ávikavist 2028, 2029, 2032 og 2039.

*Talva 3 lánsbrævalán landskassans*

| Brævalán | Nom. mió. kr. | Marknaðar-virði mió. kr. | Býtið % |
|---|---|---|---|
| 3,625% FO LB 260619 | 900 | 924 | 18,6 |
| DKK Swap 1,81% 32053 | 448 | 323 | 6,5 |
| 3,25% FO-LB 290524 | 1.100 | 1.141 | 22,9 |
| 2,375% FO-LB 280522 | 1.320 | 1.335 | 26,8 |
| 3,624% FO-LB 390701 | 1.250 | 1.256 | 25,2 |
| **Brævalán tilsamans** | **5.018** | **4.979** | **100,0** |

Mynd 2 vísir miðalrentuna, sum landskassin søguliga hevur rindað av lánsbrævaskuldini. Í 2025 rindaði landskassin í miðal 3,1% í rentu. Samanborið við miðalrentur síðani 2011 er hetta ein lutfalsliga høg renta. Á myndini sæst, at miðalrentan sum heild er hækkað síðani 2021. Hetta er ein avleiðing av, at altjóða rentustøðið er hækkað seinastu árini, serliga í kjalarvørrinum á høgu inflatiónini, sum var í 2022.

*Mynd 2 – Lánsbrævaskuld: Miðalrenta við ársenda*




Sum nevnt omanfyri afturrindaði landskassin eitt lán í juni í 2025 á 1,645 mia. kr. Hetta varð gjørt við, at landskassin í januar í 2025 hækkaði eitt 15-ára lán, sum upprunaliga varð tikið í juli 2024, við 350 mió. kr. til eina rentu á 3,55%, og við at taka eitt nýtt 3-ára lán á 1,320 mia. kr. til eina rentu á 2,419%.

### Nettoskuld landskassans

Við ársenda í 2025 var nettoskuld landskassans 201 mió. kr. Marknaðarvirðið á lánsbræva-skuldini var 4,98 mia. kr., meðan gjaldførið var 4,77 mia. kr.

Landsbankin umsitur lánsbrævaskuldina hjá landskassanum, ið er tann beinleiðis rentuberandi skuldin hjá landskassanum. Tó er eisini onnur skuld, sum óbeinleiðis er knýtt at landskassanum, eitt nú skuld hjá kommunum og skuld hjá tunnilsfeløgum. Henda óbeinleiðis skuld er ikki tikin við í teimum tølum, sum eru nevnd omanfyri.

### Frítíðargrunnurin

Í mars í 2022 varð lógin um frítíð við løn broytt, soleiðis at Frítíðargrunnurin varð avtikin, og ein nýggj skipan sett í verk. Í staðin fyri fakfeløgini er tað nú TAKS, ið umsitur bæði inngjøld og útgjøld av frítíðarpeningi. TAKS flytur uppspardu frítíðarlønina til løntakarar fyrst í mai á hvørjum ári.

Í september í 2023 gjørdi Landsbankin avtalu við TAKS um at umsita uppspardu frítíðar-lønina gjøgnum feriuárið. Landsbankin setur peningin á kontu í peningastovni til avtalaða rentu og í stutt realkredittlánsbrøv, og tryggjar samstundis, at peningurin er tøkur hjá TAKS at flyta til løntakarar fyrst í mai.

## Kredittvirðið tað sama – Aa2

Ratingstovnurin Moody's kredittmetir Føroyar. Seinasta kredittmetingin (rating) er frá septembur í 2025. Kredittmetingin var tá óbroytt í mun til undanfarnu metingina, tað vil siga Aa2 við støðugum útlitum. Hetta er triðhægsta rating av 21 møguligum.

Ein kredittmeting hevur týdning fyri at víðka um íleggjaraskaran til føroysk brævalán, og sum heild kann sigast, at tess betri ratingin er, tess lægri verður rentan, tá landið tekur lán. Kredittmetingin av landskassanum kann harumframt nýtast sum eitt útgangsstøði, tá fyritøkur og stovnar í Føroyum skulu taka lán í útlondum.

Moody's vitjar vanliga Føroyar eina ferð um árið, oftast í juni mánaði. Allar frágreiðingarnar hjá Moody's um Føroyar eru tøkar á heimasíðu Landsbankans, www.landsbankin.fo.

## Fíggjarligt støðufesti

Í 2025 gjørdi Landsbankin, umframt árs-frágreiðingina, tvær frágreiðingar um fíggjarligt støðufesti.

Fyri at taka samanum, hevur landsbankin í 2025 í greiningum og tíðindaskrivum millum annað víst á[2]:

- At landsstýrið í januar 2025 tók eitt lán á 350 mió. kr. Lánið er eitt 15 ára lán og rentan er 3,55%. Lánið varð nýtt til at rinda aftur lán, sum fall til gjaldingar 2. juni 2025. (jan)
- At landsstýrið í mai tók eitt lán á 1,32 mia. kr. við at selja lánsbrøv. Lánið er eitt 3-ára standandi lán, við eini effektivari rentu á 2,419%. Lánið, saman við láni tikið í juli 2024 og januar 2025, skal brúkast til at rinda eitt lán aftur á góðar 1,6 mia. kr. Haraftur var lánið brúkt til at fíggja hallið á fíggjarlógini í 2023 og 2024, umframt at ein partur av láninum fer til landsins gjaldføri. (mai)
- At marknaðarvirðið av lánsbrævaskuld landskassans í juni 2025 var 5,1 mia. kr. (juli)
- At ESG-skuldin er mett at vera 30% av BTÚ í 2025. EGS-skuldin fevnir um land, kommunur og sosialar grunnar. Skuldin hjá P/F Eystur- og Sandoyartunlar verður roknað uppí skuldina hjá landskassanum, tí veðhaldsskyldan hjá landinum skal, sambært altjóða leisti fyri hagtalsuppgerð, roknast uppí. (juli)
- At avkastið av ogn landskassans í 2024 var 283 mió . kr. ella 7,3%. Serliga var vøksturin á partabrævakursinum hjá sjey teimum størstu amerikansku tøknifyritøkunum; tær sonevndu "Magnificent 7", stórur. (apríl)
- At miðalrentan á landskassans skuld var 2,2% í 2024. Rentan, sum Føroyar í miðal rindar fyri síni lán, er síðani 2021 hækkað, við tað, at rentustøðið er hækkað. (apríl)
- At peningur á bók í føroysku bankunum var 22 mia. kr. í mai 2025, sum er ein vøkstur á 9,9%, roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal. (juli)

[2] Sí frágreiðingarsavn. Leinkja á forsíðuni á www.landsbankin.fo

- At peningur á bók hjá húsarhaldinum er vaksin við 7,8% (nov.).
- At í mai var samlaði árligi útlánsvøksturin hjá føroysku bankunum 5,5% roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal. (juli)
- At útlánsvøksturin var 8% í novembur, roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal, samanborið við sama tíðarskeið í fjør (nov.).
- At føroysku bankarnir høvdu útlán til føroyskar kundar fyri 21 mia. kr. í september 2025. Í septembur í fjør vóru útlánini 19,3 mia. kr., og tey eru tí økt við 1,7 mia. kr. í hesum tíðarskeiði (nov.).
- At árligi útlánsvøksturin til **vinnuna** var tilsamans 2,6% í mai 2025, roknað sum eitt miðaltal yvir 3 mánaðir. (juli)
- At útlánsvøksturin til vinnuna var 12,9% í september 2025, samanborið við sama tíðarskeið í fjør roknað, sum eitt miðaltal yvir 3 mánaðir. Tað eru útlán til tilfeingisvinnuna og tænastuvinnuna sum toga útlánsvøksturin upp (nov)
- At árligi útlánsvøkstur til **húsarhaldini** var 5,1% í mai, roknað sum eitt miðaltal yvir 3 mánaðar. (juli)
- At føroysku húsarhaldini høvdu sethúsalán fyri góðar 14,6 mia. kr. tilsamans í mai 2025; 11,1 mia. kr. í føroysku bankunum og 3,5 mia. kr. í donskum realkredittstovnum. (juli)
- At kommunurnar hava økt um skuldina við 114 mió. kr. í tíðarskeiðinum mai 2024 til mai 2025, og tær skylda tilsamans nærum 1,8 mia. kr. (juli)
- At fíggjarstøðan hjá vinnukundunum er batnað sambært bankunum. (juli)
- At fíggjarstøðan hjá privatkundum verður betri í 3. ársfjórðingi sambært peningastovnunum. (juli)
- At bankarnir meta, at fíggjarliga støðan bæði hjá sínum vinnukundum og privatkundum er batnað í triðja ársfjórðingi orsakað av rentulækkingum, men bankarnir vænta ikki, at fíggjarstøðan fer at betrast uppaftur meira í fjórða ársfjórðingi (nov.).
- At tollstríðið órógvar handilin. Eitt slíkt tollstríð fremur ikki samhandilin millum londini í heiminum, og gagnar soleiðis ikki Føroyum, tí vit innflyta tað mesta av tí, sum vit nýta, og útflyta tað mesta av tí, sum vit framleiða. (juli)
- At Føroyar hava stór avlop á gjaldsjavnanum, og at tað hevur verið avlop á gjaldsjavnanum seinastu 20 árini. (juli)
- At samlaða privata eftirlønaruppsparingin er 13,2 mia. kr. í 2023. Nærum 10,1 mia. kr. í føroysku peningastovnunum og 3,1 mia. kr. í donskum pensjónsfeløgum (juli)
- At sethúsaprísirnir halda á at veksa. Sethúsaprísirnir eru seinastu 10 árini tvífaldaðir í Tórshavn og í Suðuroy/Sandoy. Somuleiðis er prísurin á eigaraíbúðum í Tórshavn tvífaldaðir, meðan teir eru nærum trífaldaðir í stóru og smáu bygdunum seinastu 10 árini. (nov)
- At Føroyar varðveita somu kredittmeting, sum er Aa2 við støðugum útlitum og triðhægsta rating av 21 stigum. (sep)
- At føroysku peningastovnarnir hava góð úrslit, 792 mió. kr áðrenn skatt í 2024. Betraða úrslitið stavar í stóran mun frá vøkstur í nettorentuinntøkunum. (juli)
- At yvirskotið áðrenn skatt hjá føroysku bankunum var góðar 390 mió. kr. í fyrra hálvári 2025. (nov)
- At føroysku peningastovnarnar hava fá tap og lítlar avsetingar. (nov)
- At rentumarginalur var 3,75% í septembur 2025. Miðal útlánsrentan hjá føroysku privat- og vinnukundunum í føroysku bankunum var 4,40% í september 2025, ímeðan miðal innlánsrentan var 0,65%. Rentumarginalurin er munurin millum innláns- og útlánsrentuna. (nov)

## Føroya Váðaráð og systemiskir váðar

Føroya Váðaráð hevur fýra fundir árliga. Váðaráðið hevur til uppgávu, eins og Landsbankin, við støði í greiningum, at eyðmerkja váðar. Meðan Landsbankin hyggur yvirskipað at váðum, hyggur Váðaráðið eftir *systemiskum* váðum.

Samanborið við Landsbankan og Búskaparráðið, sum eru ráðgevandi, hevur Váðaráðið nøkur amboð. Váðaráðið kann geva eina eygbering, eina ávaring og eitt tilmæli[3] umframt at geva danska systemiska risikoráðnum úttalilsi, tá tað viðvíkir donskum málsøki.

Váðaráðið telur 5 limir og eru valdir fyri 4 ár. Fyrsta fýra ára skeiðið er runnið og ráðið er tí skipað av nýggjum. Limir í Føroya Váðaráði eru:

- Malan Johansen, landsbankastjóri, forkvinna.
- Torben M. Andersen, professari, Århus Universitet.
- Bjørn R. Gudmundsson, skrivstovustjóri, Hagstofa Íslands.
- Jógvan Thomsen, stjóri Vinnustovnurin.
- Ragnfríð N. Anthoniussen, fulltrúi, Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

Váðaráðið sendir út tíðindaskriv eftir hvønn fund, sum greiðir frá umrøddu evnunum. Tíðindaskrivini liggja á forsíðuni á heimasíðuni www.landsbankin.fo.

Váðaráðið vísti í 2025 millum annað á:

- At tað ikki eru greið tekin um, at systemiskir váðar eru í umbúnað í føroyska bankageiranum (mars, juni, og sep.).
- At stórt virksemið hevur verið í búskapinum í nógv ár á ráð, við lágum arbeiðsloysi og hækkandi sethúsaprísum, og hetta kann vera tekin um, at sykliskir systemiskir váðar kunnu vera í umbúnað (nov.).
- At útlánsvøksturin í føroysku bankunum var 3,3% í januar 2025 og 4,7% í apríl, samanborið við sama tíðarskeið árið fyri, rokna sum eitt 3 mánaðar miðaltal (mars og juni).
- At útlánsvøksturin stavar frá útlánum til kommunur og húsarhald, meðan útlánsvøksturin til almenn feløg er minkaður og útlánsvøksturin til privatu vinnuna framvegis er negativur (mars og juni).
- At útlánsvøksturin í føroysku bankunum er øktur og var 7,5% í juli 2025, roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal. Útlánsvøksturin stavar serliga frá útlánum til privatu vinnuna, og síðani til kommunur og húsarhald (sep.).
- At útlánsvøksturin til privatu vinnuna var 10,6% í juli 2025, og hann er sostatt øktur nógv samanborið við tíðarskeiðið frá á vári 2024 til várið 2025, tá ið hann var negativur (sep.).
- At útlán frá føroyskum, donskum, norskum, svenskum og íslendskum bankum til føroyskar kundar vóru umleið 28 mia. kr. tilsamans við árslok 2024, ið svarar til umleið 100% av BTÚ í 2024. (mars).
- At innlánini eru vaksandi í føroysku bankunum (juni og sep.).
- At innlánsyvirskotið í føroysku bankunum íroknað grønlendsku deildina hjá Føroya Banka, er vaksið til 2,6 mia. kr. í januar 2025, 2,7 mia. kr. í apríl 2025 og 3,8 mia. kr. í juli 2025, meðan tað var 3,2 mia. kr. í

[3] Sí meira um hetta á heimasíðu Landsbankans undir amboðum hjá Føroya Váðaráði.

september. Allir fýra bankarnir hava innlánsyvirskot (mar., jun., sep. og nov.).

- At úrslitið áðrenn skatt í 2024 var 792 mió. kr. tilsamans hjá teimum fýra bankunum, 16 mió. kr. hægri enn í 2023. Góða úrslitið kemur frá eini munandi betri grundinntøku, sum stavar frá einum øktum rentumarginali (juni).
- At avkastið av eginognini var millum 6% og 15,8% hjá teimum fýra bankunum, meðan solvensurin var millum 25% og 36,6% við árslok 2024 (juni).
- At niðurskrivingar og tap eru lág hjá øllum fýra føroysku bankunum (mar. og sep.).
- Sambært útlánskanningini hjá Landsbankanum, er eftirspurningurin eftir fígging øktur eitt vet eftir at renturnar lækkaðu, og rentulækkingarnar hava eisini saman við lønarhækkingum økt um tiltøkupeningin hjá privatkundunum, siga bankarnir (juni)
- At sethúsaprísirnir eru hækkaðir í 2024 um alt landið, og teir eru hækkaðir lutfalsliga meira enn tøka inntøkan. (mars)
- At bústaðarprísirnir framvegis veksa, og tað bendir á, at útboðið av bústøðum ikki megnar at fylgja við eftirspurninginum (sep.).
- At av húsarhaldum, sum hava ein skuld omanfyri 2 mió. kr. og samstundis skylda meira enn tríggjar ferðir sína inntøku, eru 5% av húsarhaldunum í Føroyum. (juni)
- At 97% av skuldini hjá húsarhaldunum er við avdráttum, 10% av skuldini hevur fasta rentu, meðan 90% av samlaðu skuldini hjá húsarhaldunum hevur broytiliga rentu (apríl 2025). (juni)
- At samlaða pensjónsuppsparingin hjá føroyingum í føroysku pensjónsfeløgunum og bankunum, og í donskum pensjónsfeløgunum, var góðar 13 mia. kr. í 2023. (juni)
- At øll fýra tryggingar- og pensjónsfeløg feløg høvdu góðan solvens við árslok 2024. (sep.).
- Tað er óheppið, at landið og kommunur ikki eru konsolideraði í góðu tíðunum, tí tað ger búskapin meira viðkvæman fyri geopolitiskari óvissu (mars)
- At tað gagnar ikki føroyska búskapinum, at almennu fíggjarviðurskiftini ikki eru styrkt í góðum tíðum, tí tað ger búskapin meira viðkvæman fyri stoytum, ið kunnu koma uttanífrá, eitt nú í sambandi við geopolitisku óvissuna (nov.).

## Búskaparráðið

Síðan mai 2021 hevur Landsbankin verið skrivstova hjá Búskaparráðnum. Búskaparráðið gjørdi tvær konjunkturfrágreiðingar í 2025; eina í mars og eina í september[4]. Harumframt gjørdi ráðið eina temafrágreiðing um kommunubúskapin og eldraøkið, sum varð almannakunngjørd í september 2025. Í frágreiðingunum vísir Búskaparráðið millum annað á, at:

- At ábendingar er um lægri vøkstur og tørvur á veruligum nýskipanum (mars)
- At neyðugt er hjá politiska myndugleikanum at endurskoða kommunubygnaðin ella skipanina millum land og kommunur, tí allar kommunur koma ikki at megna trýstið á vælferðartænasturnar. (mars)
- At eitt fíggjarpolitiskt regluverk eigur at vera sett í verk, soleiðis at politiska skipanin áhaldandi stýrir eftir greiðum fíggjarpolitiskum málum fyri komandi 5 og 10 árini. (mars)
- At handilsjavnin hevur stór yvirskot, 2 mia. kr. í 2024 (mars) og 2,3 mia. kr. frá juli 2024 til juni 2025 (sep.)
- At BTÚ er mett til 29,1 mia. kr. í 2025 (mars)

[4] Sí frágreiðingarnar á www.buskaparradid.fo.

- At almenna EGS-skuldin er 8,8 mia. kr. sum er góð 30% av BTÚ (mars).
- At hall á fíggjarlógini merkir hægri skuld, tað vil siga, at skuldin økist bæði hjá landi og kommunum tá hall er. (mars)
- At fleiri nýskipanir mugu setast í verk fyri at fáa fíggjarpolitikkin haldføran. Orsakað av demografisku broytingunum, fara útreiðslurnar í framtíðini at renna frá inntøkunum, um ikki bygnaðarligar broytingar verða gjørdar. Tað er neyðugt, at politisku myndugleikarnar fremja stórar bygnaðarligar broytingar. Verður tað ikki gjørt, er tað sannlíkt, at vælferðin, sum vit kenna hana í dag, er í vanda. (mars)
- At føroyingar eiga at fáa sum mest fyri hvørja íløgukrónu, og tí er neyðugt at raðfesta rætt í millum almennu íløgurnar. Sum amboð til at raðfesta íløgurnar eiga kost-nyttu greiningar at verða gjørdar. (mars)
- At landsstýrið eigur at seta eina nevnd at koma við nágreiniligum rationaliserings-ætlanum innan stóru vælferðarøkini; tað eru skúlaøkið, heilsuøkið og almannaøkið. (mars)
- At eindarkostnaðirnir mugu lækkast, annars fara samlaðu almennu útreiðslurnar at veksa uttan íhald næstu mongu árini. (mars)
- At um 20% av teimum sum í dag eru 80+ ára gomul eru fastbúgvandi á røktar- og ellisheimi. Verður hetta lutfallið nýtt, er tørvurin á búplássum til fastbúgvandi umleið 450 pláss afturat komandi árini. (mars)
- At lutfallið millum starvsfólk í almenna og privata geiranum ikki er broytt seinastu 10 árini; í november 2014 arbeiddu 39% av starvsfólkunum í almennari fyrisiting og tænastu og 61% í vinnuni. Í november 2024 var lutfallið somuleiðis 39% í almennari fyrisiting og tænastu og 61% í vinnuni. (mars)
- Áleið 30.000 starvsfólk vóru skrásett í november 2024 og liggur starvsfólkatalið á hægsta stigi nakrantíð (mars)
- At geopolitiski ófriðurin kann órógva bjartskygnið (mars)
- At bilamongdin (bilaparkin) hevur staðið í stað seinastu trý árini, og sølan av nýggjum og brúktum bilum er lægri seinastu trý árini, sum týðir uppá, at fólk eru vorðin meira varin við at gera stór keyp. (apríl)
- At kortnýtslan hjá húsarhaldunum var hægri í 2024 samanborið við 2023 (apríl)
- Treystið hjá føroysku húsarhaldunum er lækkað eitt vet; í nýggjastu konjunktur-kanningini var tað -12 Vísitalið minkaði eisini nógv í 2022; tá minkaði tað niður í 17, men síðani tá hevur gongdin verið uppeftir gangandi, hóast tað framvegis er undir miðal. (apríl)
- At kommunurnar og landskassin leggja trýst á búskapin, tí tey hava stór hall í hákonjunkturi (sep.) Tað er ikki tørvur á stimbrandi fíggjarpolitikki (sep.).
- At ”plenuklipparin” verður brúktur fyri at spara útreiðslur, sum ber brá av, at politikararnir ikki gera neyðugar til-lagingar, tí teir eru bangnir fyri at taka ópopulerar avgerðir (sep.).
- At Búskaparráðið mælir til at spara við at fremja nýskipanir, ikki við at brúka plenuklipparan (sep.).
- At útboðið av bústøðum er ov lítið og tað er neyðugt at politiski myndugleikarnir teka bústaðartrotið í álvara við at økja um útboðið av bústøðum og byggilendi til bústaðarbygging (sep.).
- At færri føroyingar flyta til Føroya enn úr Føroyum. Hinvegin flyta fleiri útlendingar til Føroya enn úr Føroyum. Tilgongdin til arbeiðsmarknaðin er í høvuðsheitum útlendingar (sep.).
- At vøksturin í lønargjaldingunum er 7% í 2025 (sep.).
- At virksemið í búskapinum framvegis er stórt (sep.).

- At tøkan av laksi er er økt í 2025 og er 100.000 tons. Tøkan væntast eisini at økjast í 2026 (sep.)

Búskaparráðið kom eisini við eini temafrágreiðing í oktober 2025 – ”Kommunu-búskapurin og eldraøkið”. Har vísti ráðið millum annað á:

- At eldraøkið er ein vaksandi avbjóðing. Útreiðslurnar til økið fara av vaksa nógv komandi árini, tí tað vera fleiri eldri fólk.
- At skipa kommunurnar í størri eindir, fyri at fáa betri samsvar millum støddina á kommununi og uppgávurnar. Eldraøkið liggur hjá kommununum.
- At raðfesta íløgur, ið lækka eindarkostnaðin á eldraøkinum.
- At gera ætlan fyri, hvussu arbeiðsútboðið á eldraøkinum kann vaksa, tí tørvur verður á 450 fleiri ársverkum innan røkt og eldraøkið komandi 10 árini.
- At neyðugt er at útvega starvsfólk á eldraøkinum við neyðugum fakligum førleikum.
- At staðsetingin av heilsuskúlanum er ein avbjóðing
- At seta eina samskipandi og ráðgevandi eind á eldraøkinum, sum kann leggja eina yvirskipaða ætlan fyri økið og gera ársfrágreiðingar.
- At fíggjarpolitiska regluverkið eigur at fevna um kommunurnar
- At fíggingarleisturin av eldraøkinum ikki er haldgóður og neyðugt er at endurskoða hann.

## Fíggjarviðurskifti Landsbankans

Frá 2022 er Landsbankin á fíggjarlógini, sum ein vanligur stovnur. Játtanin er á tveimum stovnsnumrum; Landsbanki Føroya og Inntøkufíggjað virksemi, Landsbanki Føroya. Samlaða inntøkujáttanin var í 2025 2,9 mió. kr. meðan samlaða útreiðslujáttanin var 11,4 mió. kr.; tað vil siga ein nettojáttan á 8,5 mió. kr.

Samlaðu útreiðslurnar hjá Landsbankanum vóru 12,3 mió. kr. í 2025 samanborið við 11,5 mió. kr. í 2024. Av teimum 12,3 mió. kr. vóru 9,1 mió kr. lønir (8,5 mió í 2024) og keyp av vørum og tænastum v.m. vóru 3,2 mió. kr. (2,8 mió. kr. í 2024). Keyp av vørum og tænastum er í stóran mun útreiðslur til KT, virðisbrævabókhald og aðra sakkøna hjálp.

Á inntøkusíðuni er játtanin 2,9 mió. kr., men inntøkan gjørdist 3,8 mió. kr. Landsbankin fær inntøkur av at umsita Arbeiðsmarknaðareftir-lønargrunnin og av at umsita ogn hjá almennum grunnum. Netto vóru útreiðslurnar tí 8,5 mió. kr, eitt vet minni enn játtanin.

Tað skal sigast, at landsbankin er skorin við 800 tkr. í 2025. Uppskotið hjá Fíggjarmálaráðnum var at skera við 600.000 kr, men fíggjarnevndin hækkaði tað við 200.000 kr., so skerjingin var tilsamans 800.000 kr.